

## Suðuroyingar á evangeliska fundarøð

Hesa vikuna er ein evangelisk fundarøð í Suðuroynni. Byrjað varð sunnukvøldið í Salem á Tvøroyri og fríggjakvøldið verður farið til Hvalbiar, har fundirnir verða í Roynhøllini frá fríggjakvøldi til sunnukvøld. Allir fundirnir verða kl. 20, uttan sunnukvøldini, tá tey verða kl. 18. Svenning av Lofti, evangelistur (myndin), verður høvuðstalari á hesum fundum, og heldur hann fundirnar saman við Páll á Lakjuni og Sveini Petersen, sum fara at taka sær av fundar- og sangleiðslu. Ymiskar sangkreftir verða við á fundunum, m.a. Suðuroyarkórið og ymiskir solosangarar. Barnamøtir verða eisini, meðan fundarøðin er. Tey verða í Roynhøllini í Hvalba fríggjadagin og leygardagin kl. 17 og sunnudagin kl. 15. Eisini verður eitt skeið leygardagin í Salem á Tvøroyri. Tá fer Páll á Lakjuni at hava fýra fyrilestrar um fýra gudsmenn í Gamla Testamenti. Skeiðið verður frá kl. 13.30 til kl. 17. Ætlanin er at hava seks slíkar fundarøðir kring landið í vár. Næst verður farið vestur í Vágar frá 6. til 10. februar, síðani Tórshavn 17. til 24. februar, Sandoyggin 2. til 9. mars, Eysturoyggin 30. mars til 6. apríl og Norðoyggjar 13. og síðani 16. til 20. apríl.

# Kemur ikki upp á tal at hækka skattin



**- Fyri okkum hevur tað sera stóran týdning at byrgja upp, at stígur kemur í búskapin, so at hann kann halda fram við at vaksa, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað eru tekin um, at stígur er við at koma í alheims búskapin og ein tann størsta avbjóðingin hjá eini komandu samgongu verður at forða fyri, at føroyski búskapurin verður raktur, so at hann tvørturímóti kann halda fram at menn-ast.

- Tað staðfesti Jørgen Niclasen, formaður Fòlkafloksins, beint áðrenn hann í morgun fór at samráðast við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin um at skipa nýggja samgongu eftir løgtingsvalið leygardagin.

Jørgen Niclasen heldur, at størstu snávingarsteinarnir í samgonguni verða spurningarnir um einskiljingar, fiskivunnu-og búskaparmál og viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark.

Men hvørji mál skulu einskiljast, vil hann onki siga um.

Hinvegin hevur hann varhugan av, at tað fer at bera til at finna semju um tey uttanríkispolitisku viðurskiftini.

Men skuldi tað eydnast at semjast um eitt samgonguskjal, er ein snávingarsteinur eftir og tað er, hvussu málsøkini skulu býtast ímillum flokkarnar.

Jørgen Niclasen væntar nevniliga ikki, at býtið ímillum flokkarnar verður heilt tað sama, sum tað var í undanfarnu samgongu.

- Tað vænti eg ikki. Tað verða onkrar broytingar og tað haldi eg eisini er sunt fyri at fáa nýggj hugskot, heldur enn at ávísir flokkar at kalla fáa patent upp á ymisk málsøki.

Formaður Fólkafloksins sigur, at fekk fólkaflokkurin sín vilja, verður størsti denturin lagdur á bæði sjálvstýrismál og á bú-skaparmálini.

- Eftir okkara tykki ganga hesi bæði málini hond í hond, men hvat endin verður, er ikki til at siga.

Men hvussu ætla tit at tryggja tykkum, at stígur ikki kemur í búskapin, sum tú stúrir fyri, kann fara at henda.

- Vit at vera varin, sigur hann og hetta er tað einasta, hann vil siga.

- Men útgangasstøðið er gott, tí vit hava ein skuldarfrían landskassa, har vit eiga líka nógv í kassanum, sum vit skylda, leggur hann afturat.

Verður skattalætti ein partur av tykkara krøvum?

- Tað vita vit onki um, tí vit eru ikki liðug at samráðast. Men tað er í øllum førum greitt, at Fólkaflokkurin fer ikki at góðtaka, at skatturin verður hækkaður?.

Hvørki beinleiðis skattur ella mvg og onnur avgjøld?

- Skattur av beinleiðis arbeiði skal undir ongum umstøðum hækka. Har eru vit hvørki til at høgga ella stinga í. Annars fer tað at vísa seg, hvat sam-ráðingarnar føra til og eitt uppskot er frammi um at leggja avgjøldini av bilum um eftir, so har kunnu broytingar verða, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum.

*Útgangsstøðið hjá eini komandu samgongu er gott, tí landskassin er skuldarfríur, sigur Jørgen Niclasen, nú farið er undir samráðingar um nýggja samgongu við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin*

# Ein nýggj samgonga skal tryggja búskaparligan vøkstur

**- Fremsta uppgávan hjá eini nýggjari samgongu, verður at tryggja búskaparligan vøkstur, so at vit fáa ráð til at betala fyri tey bleytu virðini, heldur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit skulu hava ráð til at fíggja tey bleytu virðini og sostatt verður tað fremsta uppgávan hjá eini komandi samgongu at tryggja ein búskaparligan vøkstur.

Tað staðfesti Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, beint áðrenn hann fór á fund við Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin í morgun um at halda fram við ABC samgonguni, sum sat í farna valskeiði.

Hann sigur, at fyrireikandi fundirnir ímillum ABC hava verið so góðir, at hann metir avgjørt, at grundarlag er fyri at fara undir veruligar samgongusamráðingar.

Hann sigur kortini, at onkur trupul mál vera at loysa, eitt nú fiskivinnumál, spurningurin ímillum Danmark og Føroyar og yvirtøkur og spurningurin um marknaðaratgongdina út í heim og ES málið.

- Men eftir fyrireikandi fundirnir, meti eg avgjørt, at vit kunnu finna semju um hesi málini, sum allir flokkar kunnu góðtaka.

Men verður hetta ein samgonga, sum kemur at leggja høvuðsdentin á búskaparlig viðurskifti?

- Tað, sum hevur størstan týdningin av øllum, verður at fáa búskaparligan vøkstur í Føroyum, so at vit fáa ráð til at fíggja tey bleytu virðini, sigur Kaj Leo Johannesen.

-Tað verður okkara fremsta avbjóðing, leggur hann afturat.

Merkir tað, at sjálvstýrismálið verður parkerað?

- Tað havi eg onga viðmerking til, tí valskráirnar hjá øllum trimum flokkum skal síggjast aftur í eini nýggjari samgongu og allir flokkar mugu lora onkustaðni fyri at fáa aðrastaðni.

Men Kaj Leo Johannesen leggur enn einaferð dent á, at tað er alneyðugt at tryggja ein búskaparligan vøkstur og Sambandsflokkurin hevur avgjørt eina meining um, hvussu tað kann lata seg gera.

- Fyrsta treytin fyri búskaparligum vøkstri er at tryggja okkum betri atgongd til heimsmarknaðin og tað er í samsvari við sjónarmiðini hjá hinum báðum flokkunum.

- Tað eru tey fýra frælsini í ES, sum hava størsta týdningin og so mugu vit vita um allir tríggir flokkarnir, sum nú samráðast um samgongu, megna at finna semju um tað, sigur Kaj Leo Johannesen.

Og tað heldur hann, at sannlíkindi skuldi verið fyri, tí sama, hvat andstøðan hevur ført fram, so hevur samstarvið í ABC samgonguni verið gott í farna valskeiði, leggur formaður Sambandsfloksins afturat.



*- Okkara størsta avbjóðing verður at tryggja búskaparligan vøkstur og tað skal gerast við at tryggja okkum tey fýra frælsini í ES, sigur Kal Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins*